# Kjak

Ólavur Olsen

## Hvar er eftirlit og brúkara-umboðið nú?

Tað sær út sum at bankar sleppa at gera akkurát tað, teimum lystir. Tað er, í mínum eygum, alt ov lítið eftirlit við, hvussu bankar leggja avgjøld á bæði eitt og annað. Hvør er føroyski mynduleikin, ið skal halda eyguni við bankunum? Eg kann bara ímynda mær hvat var hent, um onkur annar enn bankarnir høvdu borið seg at á henda hátt. Eisini hevur Sosialurin grein um hendan trupulleika í www.portal.fo. Greinin eitur: Bankarnir skora milliónir í smáum upphæddum.

Í dag, 1 juli 2010 vísir tað seg so, at bankarnir, uttan opinbart at vita av tí sjálvir, hava ognað sær fleiri milliónir krónir við at senda konto avrit til kundar sínar. At slíkt yvirhøvur kann henda, er ein skandala. At bankarnir, í ringasta føri vera noyddir at gjalda hendan pening aftur, er eisini ov lætt sloppi. Flestu brúkarar mugu vera klárir yvir, at avgjøldini eru sera nógv og at tann renta, ið møguliga stendst av innistandandi peningi, skjótt er vekk í avgjøldum.

Nú vóru fleiri, ið løgdu merki til hesa hendingina við konto avgjøldunum, men hvat um nú eingin hevði gjørt vart við seg? Og hvat við øllum teimum ferðum slíkt møguliga er hent fyrr?

Eg vil hervið spyrja hvør føroyskur myndugleiki hevur eftirlit við bankunum her á landi?

**Heðin D. Poulsen, Kristina Toftegaard Larsen, Karl A. Olsen og Kári á Rógvi,**
*valevni Sjálvstýrisfloksins*

## Samgongan er ikki semjufør

Seinastu dagarnar hevur samgongan sett turbo á ta marghháttligu innanhýsis andstøðuna. Edmund sigur, at javnaðurin vil loysing; Jóannes er í andstøðu til sína egnu handfaring av bankunum. Landsstýrisfólk kæra hvørt annað fyri at flyta stovnar uttan politiska viðgerð, 'tí teir vænta val.'

Vit hava mangan sitið í landsnevnd Sjálvstýrisfloksins og viðgjørt alskyns uppskot, sum sigast skulu vera royndir at skapa breiðar semjur. Men semjufelagar okkara, ið vera skulu úr samgonguni, hava skotið niður stjórnarskipan, kommunureform og seinast hava teir týðiliga avskrivað pensjónsreform í hesum valskeiðnum.

Vit staðfesta tí, at nyttuleyst og ábyrgdarleyst er at gera semju við sitandi samgongu um týðandi mál, tá ið staðfestast kann, at gjørdar semjur við samgonguna um til dømis stjórnarskipan og átøk á uttanríkispolitiska økinum ikki verða hildnar.

Vit eru sannførd um, at neyðugt er við reformum á so mongum økjum, harímillum á kommunuøkinum og skúlaøkinum, sum innara andstøðan í samgonguni longu hevur beint fyri. Men nú drotningarvitjanin er farin afturum, og samgongufólk eru farin í valstríð, fara vit heldur at brúka tíð uppá at orða okkara egna framtíðarpolitikk enn til fánýtis at fundast um hugskot hjá embætisverki ella landsstýrisfólki, sum kortini ikki fáa stuðul frá samgongufólki á tingi.

Vit fara tí sjálvi í valstríð og frábiða okkum fleiri nyttuleysar fundir um semjur fyrrenn eftir tilstundandi valið.

***Vit fara tí sjálvi í valstríð og frábiða okkum fleiri nyttuleysar fundir um semjur fyrrenn eftir tilstundandi valið***

**Hjalmar Hansen**
*aðalskrivari í Bláa Krossi*

## Rúsevni ein tikkandi bumba?

Tøkk til Anniku Olsen, landsstýriskvinnu, fyri at taka hetta evnið upp í lesarabrævi. Tað er gott at síggja landsins ovasta leiðsla tekur hetta álvarsmál fyri fult.

Rúsevni eru eitt álvarsmál, sum vit øll eiga at geva gætur. Hjá okkum í Bláa Krossi og á Blákrossheiminum er tað ein fastur partur av okkara arbeiðsøki. Vit møta misbrúkarunum, teimum nærmastu, og vit gera eitt fyribyrgjandi arbeiði eftir besta førimuni.

### Fyribyrging er meira enn upplýsing

Upplýsing er neyðug – vitan er neyðug. Upplýsing einsamøll ger tó ongan mun. Fyribyrgingararbeiðið á rúsøkinum er nógv drúgvari og meira krevjandi enn at prenta plakatir og greiða frá, hvussu rúsevni virka. Fyribyrging er eisini hugburðsarbeiðið! At arbeiða við hugburði krevur tíð, og tað er altavgerandi, at avvarðandi partar geva møguleika til tess at seta tíð av til hetta. Blái Krossur hevur í mong ár arbeitt aktivt á hesum øki, millum annað í samstarvið við kommunur og skúlar.

Harafturat er fyribyrging meira enn at møta børnunum og teimum ungu. Allar royndir vísa, at munadyggasta fyribyrgingararbeiðið verður gjørt, tá foreldrini eru við. Tá gevur fyribyrging á rúsøkinum bestu úrslitið.

***Allar royndir vísa, at munadyggasta fyribyrgingararbeiðið verður gjørt, tá foreldrini eru við***



### Í serligum vandabólki

Tað er týdningarmikið at fáa tey í tal, sum eru í serligum vandabólki. Serliga tey, sum eru byrja at brúka rúsevni, og tey, sum annars ferðast í hesum umhvørvi. Tað er týdningarmikið at fáa hesi á tal so tíðliga sum tilber. Á Blákrossheiminum hava vit havt samband við nógv ung seinastu árini. Tað eru ungfólk sum brúka rúsevnir. Blákrossheimið hevur í fleiri ár, heitt á Heilsumálaráðið um at fáa játtan til ein ráðgeva, sum burturav skal takað sær av ungum og familjum teirra, men enn hevur hendan áheitan ikki borið ávøkst. Tað er neyðugt við eini uppraðfesting á hesum økið. Loysnin, sum verður vald av mynduleikunum, er at senda fólk uttanlands í viðgerð, hóast vit í Føroyum hava fólk við hollari vitan og kunnleika innan økið. Tað er ikki nóg gott!

Sum Annika Olsen sigur *»Vit mugu taka rúsevnistrupulleikan í Føroyum í størsta álvara, tí fyri eitt lítið og viðbrekið land sum Føroyar kann hetta fáa sera álvarsligar avleiðingar fyri okkara ungdóm o.ø. Tað er ungdómurin, ið gerst offur fyri rúsevni, tað er ungdómurin, ið gerst offur fyri harðskapi, tí er tað sera týdningarmikið, at ungdómurin verður hildin skaðaleysur av rúsevnum.«*

Tað er skaðiligt at brúka rúsevnir. Vit eiga at gera eitt dygdargott fyribyrgingararbeiði, har allir partar, ið hava vitan og áhugamál, eru við.

Revsiramma er eitt – og er eitt týdningarmikið og neyðugt signal. Hin síðan er, at vit mega taka okkum av teimum, sum brúka rúsevnir, og hjálpa teimum burtur úr hesum. So leingi brúkarar eru, so er eisini ein marknaður, og so verður smuglað.